# Skuldarrøktari / skrivstovufólk

sansir.fo

**Fíggjardeildin á Strandfaraskipum Landsins sóknast eftir dugnaligum skuldarrøktara/skrivstovufólki.**

Av tí, at skuldarrøktari/skrivstovufólk okkara hevur valt at fara í annað starv, sóknast vit eftir einum fólki til at umsita skuldarar og at tryggja eina effektiva inntøkuskráseting.

**Starvið fevnir um**
Høvuðsuppgávurnar eru hesar:
- Avstemming og innkrevjing av skuldarum
- Bóking og avstemming av ferðaseðlasølu
- Inntøpping og bóking av fakturum og kreditnotum
- Fyrisiting og menning av mannagongdum í samband við fakturering, inntøkuskráseting og skuldarapolitikkinum

Tá ið tað er neyðugt, kemur tú eisini í ein ávísan mun at røkja aðrar uppgávur á Fíggjardeildini.

**Førleikakrøv**
Vit vænt a:
- at tú hevur skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi.
- at tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt og dugir at samstarva
- at tú hevur kunnleika og royndir í Navision fíggjarstýringsskipanini
- at tú hevur kunnleiki og royndir í Microsoft Office-forritunum
- at tú hevur góð evni at orða teg bæði skrivliga og munnliga
- at tú hevur góðan røkjuskap

**Uppgávurnar hjá Fíggjardeildini**
Høvuðsuppgávan hjá Fíggjardeildini er at veita leiðsluni í fyritøkuni eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna búskaparstýringina hjá fyritøkuni.
Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Fyriskipan av roknskaparverkinum
- Uppsetan av fíggjarætlanunum
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga
- Játtanareftirlit
- Lønarfyrisiting

**Setanartreytir og umsókn**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og verður lønt í lønarflokki 4.

Arbeiðsstaðið er Høvuðsskrivstovan Yviri við Strond 4 í Tórshavn.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum, og møguligum viðmælum, skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att: Starvsfólkadeildin
Postboks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. januar 2007 kl. 12.00

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Jógvan Rubeksen, fíggjarleiðara, á tlf. 543021 ella e-post: jor@ssl.fo

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, og hevur sum endamál at nøkta landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Strandferðslan umsitur 29 farleiðir (7 Oyggjaleiðir og 22 Bygdaleiðir). Talið á flutningsførum er 8 ferjur og 40 bussar. Samlaða talið av starvsfólkum svarar til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS



EIN FASTARI KROPP
UTTAN
SKURÐVIÐGERÐ

- KLÆNKAR
- MINKAR CELLULITE (APPELSINHÚÐ)
- FASTARI VØÐDAR OG KROPP
- TEKUR BURTUR STREKKMERKIR

Upplatingartilboð
5 andlits- ella kroppsviðgerðir
fyri kr. 995,-

Bílegg tíð á tlf. 32 20 45
ella á www.intoneclinic.dk

Opið er mána- til fríggjadag 10.00-19.00

in • tone clinic
J. Paturssonargøta 18 · Tórshavn
Tlf. 322045

in•tone clinic
ALL IN ONE SKØNHEDSCLINIC

ÚTSØLU
endabrestur



Hjálpi okkum at tøma handilin
Alt fyri -50% til -75%

Skóbúðin hjá Mundu
Garðsv. 16
520 Leirvík
Tel 44 30 80

UPPLATINGARTÍÐIR
mánad.-fríg. 14.00-17.30
leygardag 10.00-13.00

Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM
&
PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
TELEFON 22 50 00
Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA